ítróttur

Nr. 31 • týsdagur • 15. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sørvingar í serflokki

**Tað var ongantíð nakar ivi um, hvat var betra liðið, tá ið SÍ og Mjølnir spældu steypafinalu hjá monnum leygardagin. Sørvingar vóru snøgt sagt nógv betur**



*Mjølnir royndu at stríðast, men teir vóru alla tíðina greitt við undirlutan móti SÍ, sum nú tykist stevna beint móti greipuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

STEYPAFINALA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

SÍ livdi væl og virðiliga upp til sítt favorittheiti í steypafinaluni hjá monnum leygardagin. Sørvingar vístu frá fyrsta bríksli, at teir í løtuni eru nógv tað besta mansliðið í føroyskum flogbólti í løtuni, og at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn meistaraheitið er í hús.

## Framúr blokkur

Tað var eisini SÍ, sum fekk bestu byrjanina upp á dystin. Beinan vegin í fyrsta settið vístu teir sína styrki, og serliga var tað blokkurin hjá sørvingum, sum royndist serstakliga væl. Ilt er at taka nakran burtur úr, men tað skerst ikki burtur, at ein leikari sum Ólavur Jensen var sera drúgvur.

Hóast Ólavur ikki er av størstu monnum, so hevði hann fleiri góðar blokkar í fyrsta settinum, og eisini í álopsspartinuim royndist hann væl. Eisini veteranurin Kell Jensen royndist væl í blokkinum.

Sørvingar tóktust sera væl upplagdir, og væl stuðlaðir av sínum einastandandi fjepparum, fingu teir skjótt lagt seg avgerandi á odda í fyrsta settinum.

Tað gekk ikki lang tíð, so vóru teir á odda 13-7, og ikki minst var Rajko Petrovic ómetaliga stinnur í álopsspælinum. Rajko hevur neyvan havt eitt betur kappingarár enn í ár, og hann vísti leygardagin, at tá ið hann er í rætta lagnum, so er hann at kalla ómøguligur at steðga. Ferð aftaná ferð løgdu teir upp til hann á kantinum, og Rajko var eirindaleysur og langaði bóltarnar í gólvið hinumegin netið.

Flúgvandi byrjanin hjá SÍ ávirkaði eisini mótstøðumenninar úr Mjølnir, og tað gekk heldur ikki long tíð, so fóru klaksvíkingar at hanga við høvdinum. Klaksvíkingar tóktust snøgt sagt ikki trúgva upp á, at tað fór at bera til at gera nakað við SÍ, og leikararnir hjá Mjølnir tóktust eisini rættuliga fjáltursstungnir. Hetta sást kanska eisini best í álopsroyndunum hjá klaksvíkingum, tí teir vóru alt ov óneyvir í fyrsta settinum, sum SÍ lættliga vann 25-18.

## Sama mannagongd

Í næsta settinum hildu sørvingar fram, har teir sleptu í fyrsta settinum. Við einari øgiligari leikferð settu teir eitt stórt trýst á Mjølnir, og klaksvíkingarnir høvdu framvegis trupulleikar av at fóta sær móti árgrýtnu sørvingunum.

At SÍ hevði mentalu yvirvágina sást eisini væl, millum annað tí at teir allatíðina vunnu fleiri lættar bóltar, har teir ikki skuldu ómaka sær nakað serligt fyri at vinna bóltin.

Oddaliðið legði seg á odda 14-7 í settinum, men so fótaði Mjølnir sær eina lítla løtu, og serliga tóktist tað sum um, at leikandi venjarin hjá klaksvíkingum, Stanislav Hristov, kom í gongd, og teir fingu tikið seg nakað inn á sørvingar.

Men tað gekk tó ikki long tíð, so svaraði SÍ aftur, og teir løgdu aftur sjógv millum seg og Mjølnir. Hugaligt var at síggja stóru breiddina hjá sørvingum, har allir mans hildu seg til, og eitt nú spældi liðskiparin Jón Nielsen ein serstakliga góðan dyst. Jón var sera ágrýtin, og umfamt at hann hevði nógvar framúr góðar móttøkur, so vísti hann seg frá síni allarbestu síðu í álopspartinum, har hann fleiri ferðir við øgiligari kraft langaði bóltin í gólvið hjá Mjølnir.

SÍ fekk sín fyrsta settbólt